# Handilsmiðdepil fer at kollvelta

**Gongur sum Óli Marner Christiansen ætlar, letur ein stórur handilsdepil upp í Klaksvík longu í november mánaði næsta ár.**
**– Hetta skal gerast tann nýggi savningarstaðurin hjá øllum norðoyingum, sigur hann um ætlanina, sum varð víst fram ígjár**




*Óli Marner Christiansen leggur fram nýggju ætlanina fyri miðbýin í Klaksvík. – Vit vænta góða undirtøku frá fólki, sigur hann*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

MIÐBÝARÆTLAN

*Snorri Brend*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

**Klaksvík:** – Tvær lítlar undirskriftir, sum koma at kollvelta handilslívið í býnum!

Øðrvísi kann ein ikki lýsa løtuna, tá stigtakarin Óli Marner Christiansen og borgarstjórin, Steinbjørn O. Jacobsen seinnapartin í gjár settu undirskriftir sínar undir miðbýarætlanina í Klaksvík.

Talan er um at byggja næststørsta handilsbygning í Føroyum, og sum kemur at hýsa einum hópi av handlum, skrivstovum og øðrum virksemi.

Hinvegin fevnir ætlanin eisini um eina sonevnda MargHøll, har møguleikar verða fyri einum hópi av tiltøkum, heilt frá ráðstevnum og sølustevnum til innandura fótbóltskappingar.

Umframt hetta er eitt Torg í miðjum bygningi, har mong ymisk tiltøk kunnu stáplast uppá beinini. Við hesum ynskir ein at fáa ein savningarstað fyri klaksvíkingar og norðoyingar – og helst ein góðan part frá restini av landinum.

Ætlanin er at fara undir verkið sum skjótast, tí miðað verður eftir at lata Handilsdepilin upp í november mánaði 2007 – tað vil siga um hálvtannað ár.

Kostnaður fyri ætlanina er um 130 mió. kr. Miðað verður eftir at alt skal verða merkt av góðsku og dygd, og tí slepst neyvan undir ein minni prís enn henda.

Tað eru longu liðin nógv ár síðani ein partur av víkini varð fylt út til eitt slíkt endamál. Hetta hevur higartil ligið um ein myrk og køld grótrúgva í hjartanum av Klaksvík.

Nú er umsíðir líkt til at hetta økið verður fylt við lívi, fólki og fjølbroyttum virksemi.

– Hetta skal ikki bert snúgva seg um handlar og tílíkt. Hetta skal eisini gerast eitt sosialt savningarstað fyri allar Norðoyingar, sigur stigtakarin, Óli Marner Christiansen.

## Royndir savnast

Í Klaksvík varð í síni tíð eitt 20.000 fermetrar stórt øki fylt út innan í sjálvari víkini, har ætlanin leingi hevur verið at ein slíkur handilsdepil skuldi standa.

Spurningurin hevur bara verið, hvat tað skuldi brúkast til – og nær, ið nakað virksemi fór at koma her.

Fleiri ætlanir hava verið frammi, men henda ætlanin sum seinnapartin í gjár varð løgd fram, er løgd væl til rættis og er kannað og fyrireikað út í æsir.

– Vóru vit byrjaðir fyrri, høvdu vit neyvan havt eitt so gott prosjekt, sum tað vit hava her í dag. At vit hava bíðað so leingi, hevur bara gjørt ætlanina betri og við størri undirtøku, sigur Óli Marner.

Stigtakararnir hava havt gott samstarv við tvær danskar fyritøkur, sum á hvør sín hátt hava drúgvar royndir í slíkum arbeiðum.

Millum verkætlanirnar sum hesar báðar fyritøkur hava átt lut í eru Fields, Fiskecenteret og Frederiksbergcenteret, umframt ein hóp av øðrum miðbýarætlanum og handilsdeplum í Danmark, Íslandi og øðrum londum.

Allar hesar royndirnar tilsamans verða nú savnaðar á einum og sama staði – mitt í hjartanum í Klaksvík, sum eftir ætlan skal gerast tað nýggja savningarstað norðoyinga.

Ætlanin er tí at hesin handilsdepilin og Marghøllin skulu hýsa konsertum, ráðstevnum og øðrum stórtiltøkum.

## 18 handlar

Hóast ætlanin ikki varð kunngjørd fyri almenninginum fyrrenn í gjár, er líkt til at stigtakararnir hava havt samband við ein hóp av fyritøkum og handlum, sum í framtíðini kunnu og skulu hava innivist her.

Óli Marner vildi undir framløguni ikki nevna nøvn á fyritøkum og handlum. Hann vísti kortini á, at Norðoya Sparikassi, sum er ein av eigarunum, skal hava nýtt høvuðssæti í miðbýnum.

– Annars hava vit seriøsar samráðingar við ein matvøruhandil, sum eisini skal inn. Men tað er ov tíðliga at nevna nakað navn enn, sigur Óli Marner.

Í aðrar mátar er ætlanin at einir 16-18 serhandlar skulu inn í handilsdepilin, umframt fitness-depil, Netcafé, bókasavn og tílíkt.

## Mennir handilslívið

Undir fyrireikingunum hava stigtakararnir havt fleiri fundir við Handilsfelagið í Klaksvík.

Fyrr var kanska ein størri mótstøða ímóti eini slíkari ætlan, men í dag er vent í holuni: Stór semja tykist vera um, at ein slíkur handilsdepil er avgjørt neyðugur í dag.

Ein annar spurningur er, um hesin kanska fer at drepa handilslívið í býnum. Men hesum er Óli Marner als ikki samdur í.

Fleiri av handlunum í býnum sýna nevniliga hesi ætlanini stóran áhuga, og er longu nú gjørd munnlig avtala við 18 teirra. Umframt hesar verða eisini handlar uttanfyri Klaksvík í deplinum.

– Tað er eisini spennandi, at fleiri klaksvíkingar ætla sær nú undir nýggjar handlar sum ikki finnast í býnum í dag.

– Hetta haldi eg vera sera positivt og er at fegnast um, sigur Óli Marner.



*Fólk lurta við áhuga – onkur er kanska eitt sindur hugsunarsamur*